

**TOYOTA COROLLA 1,6 L/B**

**Skrásetingarnr.:** GL 088 **KM:** 103.000
**Árgangur:** 18.05.98 **Seinast sýnaður:** 27.10.03

**Útgjald: kr. 22.960,-** **Kr. 65.000,-**



**TOYOTA YARIS 1,3 H/B LUNA V/KOMF** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr.:** MP 647 **KM:** 53.000
**Árgangur:** 04.07.01 **Seinast sýnaður:** 06.04.05
**Viðmerking:** Fjarstýrt sentrallás - Leðurróður - Radio/CD - Elrútar framman

**Útgjald kr. 26.650,-** **Kr. 106.000,-**



**TOYOTA COROLLA 1,6 TERRA SEDAN**

**Skrásetingarnr.:** AT 797 **KM:** 127.000
**Árgangur:** 22.03.00 **Seinast sýnaður:** 16.03.04
**Viðmerking:** El rútar - el spegl - hæddarstilling av lyktum - fløguspælara - informatiónsdisplay - 4 x airbags

**Útgjald kr. 28.910,-** **Kr. 82.000,-**



**TOYOTA AVENSIS 2,0 TD**

**Skrásetingarnr.:** KL 802 **KM:** 130.000
**Árgangur:** 05.05.99 **Seinast sýnaður:** 14.06.04
**Viðmerking:** Fjarstýrt sentrallás - El rútar - el spegl - fløguspælara - krók - hæddarstilling av lyktum - 4 x airbags

**Útgjald kr. 36.260,-** **Kr. 103.000,-**



**TOYOTA COROLLA 1,9 D TERRA S/D** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr.:** JF 324 **KM:** 58.000
**Árgangur:** 19.04.00 **Seinast sýnaður:** 10.03.04
**Viðmerking:** El rútar - el spegl - hæddarstilling av lyktum - fløguspælara - informatiónsdisplay - 4 x airbags - El rútar - el spegl - hæddarstilling av lyktum - fløguspælara - informatiónsdisplay - 4 x airbags

**Útgjald kr. 34.510,-** **Kr. 98.000,-**



**OPEL ASTRA 2,0 DIESEL, AUT.GEAR** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr.:** DN 206 **KM:** 40.000
**Árgangur:** 29.03.00 **Seinast sýnaður:** 14.04.04
**Viðmerking:** Elrútar/spegl - Fjarstýrt sentrallás - Radio/Fløguspælari

**Útjald kr. 37.800,-** **Kr. 108.000,-**



**TOYOTA YARIS 1,0 H/B TERRA FREETRONIC** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr.:** HM 192 **KM:** 45.000
**Árgangur:** 20.11.01 **Seinast sýnaður:** 14.02.05
**Viðmerking:** Vanligt gearskifti, men automatisk kopling.

**Útgjald kr. 21.650,-** **Kr. 86.000,-**



**SKODA OCTAVIA 1,6**

**Skrásetingarnr.:** MG 284 **KM:** 65.000
**Árgangur:** 27.11.98 **Seinast sýnaður:** 07.01.05

**Útjald kr. 23.450,-** **Kr. 67.000,-**



**TOYOTA AVENSIS 2,0 TD Stw.** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr.:** MD 583 **KM:** 87.000
**Árgangur:** 29.09.98 **Seinast sýnaður:** 09.08.04
**Viðmerking:** Fjarstýrt sentrallás - El rútar - el spegl - fløguspælara - krók - hæddarstilling av lyktum - 4 x airbags

**Útgjald kr. 34.510,-** **Kr. 98.000,-**



**SUBARU LEGACY GL 2,0**

**Skrásetingarnr.:** HU 698 **KM:** 115.000
**Árgangur:** 25.09.96 **Seinast sýnaður:** 25.08.04
**Viðmerking:** Sentrallás - Elrútar aftan og framman - Radio/CD

**Kr. 48.000,-**

Fyrivarni verður tikið fyri møguligum prentvillum.

**Lagalig fígging fæst til brúktu bilarnar**

**6 mánaða garanti**

**Vit bjóða nú 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn 85.000,-**
Garanti skipanin, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, ið eygsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar ella væntandi tænastueftirlit.
Eingin gandur og eingir smáir bókstavir.
Kom og vitja okkum · landsins fremstu bilasølu.

Vegurin Langi • Hoyvík • Tel. 353040 • Fax 353041
rs@reyniservice.fo • www.reyniservice.fo

**REYNI SERVICE** P/F


# Hugnaligu vetrarítrivini byrja spakuliga aftur

**Nú dagarnir styttast fara fólk spakuliga at fyrireika seg til at fara undir tey hugnaligu vetrarítrivini. Mánakvøldið 26. september byrjar Felagskórið Gøta/Leirvík venjingarnar aftur við Heðin Kambsdal sum kórleiðara**



*Konsert í Vesturkirkjuni fyri jól í fjør*

KÓRSANGUR

Felagskórið Gøta/Leirvík, ið er mannað við sangarum úr einum stórum parti av Eysturoy, byrjar venjingarnar aftur mánakvøldið 26. september kl. 19.30 í niðaru hædd í eldrasambýlinum Gøtubrá, ið er í Norðragøtu. Kórið verður í hesum árinum 20 ár, og 20 ár kann kanska haldast at verða ov ungt til at flyta inn á sambýli, men hølini eru væl egnað til ung fólk eisini, og samstundis vóna vit, at vit við at verða har, kunnu verða við til at økja um trivnaðin hjá teimum sum búgva har.

Seinastu tvey árini hevur Martin Mouritsen verið kórleiðari hjá Felagskórinum, men hann bar seg undan av tíðarávum. Kórið hevur síðan heitt á Heðin Kamsdal, ið eitt skifti vandi kórið í 5 ár. Heðin játtaði og sostatt fer hann nú undir 6. árið saman við Felagskórinum Gøta Leirvík, væl á veg at taka Bjarna Restorff, ið hevur rekordina við 7 árum. Venjararnir, ið kórið hevur havt hesi 20 árini eru: André Demidoff, Thomas Anderson, Ernst Dalsgarð og so teir tríggir omanfyrinevndu.

Skráin hjá kórinum er vanliga sera fjølbroytt. Millum annað sálmar, sangir, negro spirituals, rytmiskur tónleikur og nakað av løttum klassiskum tónleiki. Kórið hevur fast 2 konsertir um árið - eina fyri jól og eina um várið. Harumframt er kórið við til ymisk lokal tiltøk, so sum tá jóltrøini í bygdunum verða tendrað og helst er Felagskórið tað kórið, ið hevur sungið flest skip í havn.

Í sambandi við at kórið fyllir 20 ár í hesum sangárinum hevur kórið boðið seg fram at verða vertur á árligu kórstevnuni í vár. Tá kórið fylti 10 ár, var kórstevna eisini í bygdunum, og eru vit í kórinum so smátt farin at gleða okkum at verða vertir fyri kórsangarum í Føroyum aftur.

Kórið heitir inniliga á øll sum hava hug at syngja um at møta upp. Tað hevði verið sera hugaligt at kunnað hátíðarhildið 20 ára dagin við ein stórum og góðum kórum. Tað eru ongi krøv til upptøku. Um tú ivast um sangkór er nakað fyri teg, ert tú vælkomin at tosa við onkran í kórinum.




## Íbúðir ella skrivstovur við útsýni yvir Nólsoyarfjørð til leigu/sølu

Bygningurin, Yviri við Strond 19, er í trimum hæddum og kann nýtast til bústað og vinnuligt endamál.

Bygningurin kann leigast sum hann er ella í trimum leigumálum á einar 150 fermetrar hvørt. Nú er bygningurin innrættaður til skrivstovur, men vit tillaga innrættingina til tørvin hjá tí, ið ynskir at leiga.

Her er stutt úr miðbýnum og fram úr gott útsýni yvir Nólsoyarfjørð. Økið rundan um bygningin er fríðkað og annars gjørt til parkeringsøki og innkoyring. Harumframt eru góð parkeringsviðurskifti í økinum.

Áhugaði at leiga ella keypa bygningin eru vælkomin at venda sær til:

Pf. Meinhardt Arge
Att.: Finnbogi Arge
Tlf.: 345400 ella tlf. 225088

| | Yviri við Strond 19 |
|---|---|
| Matrikkulnummar | 620z |
| Støðd á grundøki | 733m$^2$ |
| Grundvídd á bygningi | 150m$^2$ |
| Byggiár | 1986 |
| Gólvvídd | 447m$^2$ |
| Loftsrúm | - |
| Gólvvídd tils. | 447m$^2$ |
| Skrivstovur/fundarhøli | 14 |
| Móttøkuhøli | 1 |
| Kopirúm og edv-rúm | 2 |
| Goymslurúm | 4 |
| Toilet | 6 |
| Køkur og matstova | - |

P/F Meinhardt Arge
við Oyggjarvegin www.bilarge.fo